# Aftur á slóðina

**Í september 2006 varð ein túrur gjørdur til Grønlands fyri teir sum róðu út við bátum á Hvarvinum frá síðst í 50-unum til seinna partin av 60-unum. Tað vóru Magnus Fuglø og Jógvan Weihe í Havn, sum báðir vóru við í hesi vinnu, sum skipaðu fyri túrinum**

## Ferðafrásøgn

*Lagt til rættis:*
**Magnus Gunnarsson**
blaðmaður
maggi@sosialurin.fo



*Hesir eru teir fimm, sum vóru við túrin í Grønlandi, f.v.: Magnus Fuglø, Hjalmar Petersen, Jógvan Weihe, Jógvan Háskor og Bjarni Dalsgarð. Myndin er tikin í bowlinghøllini í Havn*

Í 50- og 60-unum vóru fleiri hundrað føroyingar í Grønlandi, har teir róðu út við bátum og høvdu sína inntøku í hesum arbeiði. Hetta var ein sermerkt tíð, og fleiri bøkur eru skrivaðar um hesa vinnu.

Í fjør tóku tveir havnarmenn stig til at fara yvir aftur til Grønlands at vitja á nøkrum av hesum støðum og minnast á farnar dagar. Teir vóru Magnus Fuglø og Jógvan Weihe, sum báðir hava verið við í hesi vinnu, sum skipaðu fyri túrinum. Teir hava í mong ár hava havt eitt ynski um at koma aftur til Grønlands.

Endamálið við túrinum var at vitja aftur á teimum støðum, har útróðurin gekk fyri seg.

Skip, sum vóru við í hesi vinnu í Grønlandi, vóru t.d. skonnartirnar Tinganes, Kongshavn, Hvítabjørn, Atlantsfarið, Mars og Marité.

Magnus Fuglø sigur soleiðis frá um túrin "Vit settu okkum í samband við ferðaskrivstovuna í Nanortalik, har vit greiddu frá ætlanum okkara við túrinum og spurdu hvat tað kom at kosta fyri 8 dagar. Svar kom beinanvegin, har var eingin trupulleiki. Vit fingu at vita, hvussu nógv tað kostaði fyri hvønn og tóku av tilboðnum.

Úr Vágum 5. september

Túrurin varð settur til 5. september 2006. Vit settu eina lýsing í bløðini, sum vit kallaðu "aftur á slóðina", har høvi var at tekna seg til túrin. Um ólavsøkumundið høvdu einir átta mans teknað seg, men tá so tíðin nærkaðist, til at vit skuldu fara, komu fleiri avboð, so vit vóru einans fimm mans eftir. Vit tosaðu saman, um vit skuldu fara, men tað varð einmælt samtykt, at túrurin skuldi fullførast.

5. september var farið úr Vágum. Fyrst til Reykjavíkar, har vit steðgaðu í ein tíma, síðan varð flogið til Narsarsuak í Suðurgrønlandi. Tað tók umleið tveir tímar. Eftir at vit høvdu gist í Narsarsuak, fóru vit um morgunin við tyrlu suður til Nanortalik, umvegis Julianehåb. Túrurin tók ein lítlan tíma. Tá vit komu til Nanortalik, stóð ein ferðaleiðari og tók ímóti okkum. Vit vórðu koyrdir til hotellið "Tubilak", har vit vóru teir einastu gestirnir. Vit skuldu eta á einum øðrum hotelli "Hotel Kap Farvel".

Vit gingu í býnum og tóku myndir og hugnaðu okkum. Klokkan 8 morgunin eftir skuldu vit sigla. Báturin, sum var ein 30 tonsari, ið var umbygdur til at sigla við ferðafólki og var sera væl útgjørdur við t.d. seks koyggjum umborð. Veðrið var av tí besta.

Tað tók okkum fimm tímar at sigla til bygdina Appiladok, sum er miðskeiðis í Prins Kristians Sund. Har steðgaðu vit í ein tíma. Síðan varð aftur siglt í fimm tímar til veðurstøðina Prins Kristians Sund. Tá vit høvdu lagt at bryggjuni, komu tveir mans oman at taka ímóti okkum, tað vísti seg at vera tveir føroyingar, havnarmaðurin Finnbogi Johannesen, sum hevur arbeitt í útvarpinum, og vágbingurin Trygvi Karlson, ið hevur búð í nógv ár í Nanortalik og hevur familju har. Teir arbeiddu báðir á radiostøðini í Prins Kristians Sund.

Vit spurdu Finnboga, hvussu nógv fólk arbeiddu á radiostøðini í Prins Kristians Sund. Hann segði, at teir vóru bara fimm mans eftir, síðan alt varð automatiserað. Seinast eg var í Prins Kristian Sund vóru 35 mans har. Tað var í 1960.

Tíðliga morgunin eftir, var farið avstað. Fyrsta plássið var "Hylurin", sum vit skuldu fara til, tað tók okkum hálvan tíma at sigla. Tað var ein løgin kensla vit høvdu, tá vit komu inn í "Hylin" eftir 40 árum. Vit steðgaðu eina løtu og



*Nanortalik*



*Veðurstøðin í Prins Kristians Sund. Sjálv radiostøðin er ovast*



*Brimoyggin*